FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Starvsskipan fyri Brúkararáðið fyri Landsnet

§ 1. Brúkararáðið fyri Landsnet virkar sambært virðunum hjá Landsfyrisitingini og hevur sum høvuðsuppgávu at ráðgeva leiðsluni á KT Landsins innan skipan og stýring av Landsneti. Undir hesum; vavið av tænastunum, prísáseting, bygnaðarlig viðurskifti, útveiting og KT trygd. Harumframt virka limirnir í Brúkararáðnum og Brúkararáðið sum umboð fyri einstøku greinarnar, t.e. stjórnarráð við stovnum, sum eru partar av Landsneti, vísandi til áseting 1.2.1. í standardsáttmálanum (SLA) millum KT Landsins og stovnar.

§ 2. Í Brúkararáðnum fyri Landsnet situr eitt umboð fyri hvørt stjórnarráð, eitt umboð fyri kommunalu eldrasamstørvini í Landsneti og eitt umboð fyri Føroya Løgting.
Stk. 2. Stjórnarráð kunnu velja at hava felags umboð.
Stk. 3. Fyri hvønn lim verður tilnevndur ein varalimur. Um nýggjur limur ella varalimur skal veljast í úrtíð, er tað uppgávan hjá aðalstjóranum, ella aðalstjórunum í teimum førum talan er um ein lim, ið umboðar eitt ella fleiri stjórnarráð, at finna nýggjan lim ella varalim.
Stk. 4. Limir og varalimir í Brúkararáðnum verða tilnevndir árliga av teimum í §2 stk. 1 nevndu fyri hvønn ársfund hjá Landsneti. Limirnir í Brúkararáðnum og varalimirnir kunnu verða afturvaldir.
Stk. 5. Umframt mál, sum KT Landsins leggur fyri Brúkararáðið, kann Brúkararáðið taka mál upp av sínum eintingum, eftir fráboðan ella við støði í kæru.
Stk. 6. Brúkararáðið skipar seg við formanni og varaformanni. Um undanfarni formaður og næstformaður ikki verða afturvaldir, er tað elsti limur, sum er fyribils formaður, til nýggjur formaður og næstformaður eru valdir. Um formaðurin fer úr Brúkararáðnum í úrtíð, skal Brúkararáðið skipa seg av nýggjum.
Stk. 7. Brúkararáðið endurskoðar starvsskipanina á hvørjum ári á fyrsta fundi.

§ 3. KT Landsins hevur skrivstovuarbeiðið hjá Brúkararáðnum um hendi.

§ 4. Formaðurin í Brúkararáðnum og deildarstjórin í KT Landsins leggja til rættis og leiða fundirnar.

§ 5. Brúkararáðið hevur fund mánaðarliga á teimum fundardøgum, sum Brúkararáðið hevur samtykt, tó ikki í summarfrítíðini, og annars so ofta sum formaðurin metir, at tørvur er á at hava fund.
Stk. 2. Kallað verður inn til fundar við eini freist upp á í minsta lagi 7 dagar, um ikki formaðurin tekur aðra avgerð, tí at eitt mál hevur skund.
Stk. 3. Við fundarboðum skal fylgja ein dagsskrá, sum so vítt møguligt skal tilskila, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum, og hjálagt skal vera tað tilfar, sum er neyðugt til tess at viðgera málini.

Stk. 4. Limir, sum ikki kunnu møta til fundar, skulu boða sínum varalimi til fundar umframt at boða formanninum frá hesum. Eru evni á skránni, har vitan og førleikar frá øðrum starvsfólkum í stjórnarráðunum, ella á stovnum knýtt til eitt stjórnarráð, kunnu gagna viðgerðini, kunnu onnur starvsfólk møta á fundi saman við limi ella umboðandi eitt stjórnarráð.

§ 6. Føst punkt á dagsskránni fyri fundir í Brúkararáðnum eru hesi:
1) Góðkenning av fundarfrásøgn
2) Innkomin mál frá limum í Brúkararáðnum
3) Deildarstjórin fyri KT Landsins kunnar um týðandi viðurskifti og hendingar í KT Landsins og Landsneti
4) Innkomin mál. Allir limir kunnu koma við málum, sum skulu viðgerast, men formaðurin kann avgera, at málið kemur fyri á einum øðrum fundi, um stundir ikki eru at viðgera ella fyrireika málið.

Stk. 2. Regluliga, á leið hvønn ársfjórðing, leggur deildarstjórin fram:
a. Fíggjar- og rakstarstøðuna, undir hesum høvuðsraðfestingina hjá fyrisitingini av uppgávum, tal av brúkarum og onnur rakstrartøl. Í sambandi við gerð av árligu fíggjarætlanini, verður uppskot til fíggjarætlan lagt fram fyri komandi árið
b. Støðulýsing av nýggjastu tøkni, og hvørjar ætlanir KT Landsins hevur í hesum sambandi.

§ 7. Brúkararáðið er viðtøkuført, tá formaðurin ella næstformaðurin, um formaðurin ikki er á fundi, og í minsta lagi 3 av hinum limunum eru hjástaddir.
Stk. 2. Brúkararáðið tekur avgerð við vanligum atkvøðumeiriluta. Í førum har tað stendur á jøvnum millum partarnar, er atkvøðan hjá formanninum ella næstformanninum, um formaðurin ikki er á fundi, avgerandi.
Stk. 3. Um stjórnarráð hava felags lim, hevur viðkomandi umboð 2 atkvøður.

§ 8. Eftir hvønn fund í Brúkararáðnum skrivar KT Landsins fundarfrágreiðing, har tilskilað verður:
1) Hvørjir limir hava verið við í viðgerðini av málunum
2) Innihald og avgerðir hjá Brúkararáðnum í teimum einstøku málunum. Um atkvøtt hevur verið, verður atkvøðutalið og atkvøðubýtið tilskilað. Limir hava rætt til at fáa minniluta-sjónarmið skrivað í fundarfrágreiðingina.
Stk. 2. Limirnir í Brúkararáðnum og teirra varafólk skulu í seinasta lagi 7 dagar eftir ein fund hava møguleika at heinta fundarfrágreiðingina í skjalagoymsluni hjá Brúkararáðnum. Broytingar og rættingar til fundarfrágreiðingina verða viðgjørdar á næsta fundi og førdar inn í næstu fundarfrágreiðing.

§ 9. Ein limur í Brúkararáðnum kann ikki taka avgerð, vera við í eini avgerð ella annars vera við í viðgerðini av einum máli, um so er, at limurin er ógegnigur eftir fyrisitingarlógini.
Stk. 2. Ein limur, sum gerst kunnugur við umstøður, sum kunnu skapa iva um gegnið hjá viðkomandi, skal sum skjótast boða formanninum frá hesum.
Stk. 3. Brúkararáðið ger av, uttan at viðkomandi limur luttekur, um viðkomandi er ógegnigur.

§ 10. Á vári verður skipað fyri ársfundi, har umboð fyri allar stovnarnar í Landsneti verða bodnir við. Fundurin hevur hesa skrá:

1. Formansfrágreiðing
2. Kunning um tilnevning av limum til Brúkararáðið
3. KT Landsins greiðir frá um farna árið og kunnar um ætlanir
4. Innkomin mál
5. Ymiskt

Stk. 2. Allir stovnar í Landsneti kunnu fáa mál til viðgerðar undir evninum innkomin mál. Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu sendast Brúkararáðnum í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin. Brúkararáðið skal hava umrøtt hesi mál áðrenn ársfundin.

Stk.3. Ársfundurin kann útsetast um serligar umstøður tala fyri tí. Limirnir í brúkararáðnum halda fram, til nýggir limir eru valdir.

§ 11 Starvsskipanin skal góðkennast av Fíggjarmálaráðnum.

§ 12. Starvsskipanin fær gildi hin 1. apríl 2022.

Uni Rasmussen
landsstýrismaður

/Bjarni Askham
Bjarnason aðalstjóri